# Morning Dew kemur út í Sveis

**Høgni Lisberg kundi í gjár skriva enn eitt land á listan yvir støð har fløgan Morning Dew er givin út, hesaferð er tað Sveis, ein marknaður ið als ikki er ókendur fyri unga leirvíkingin.**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



Ársins fløga 2005 í Føroyum varð í gjár givin út í Sveis. Morning Dew hjá Høgna Lisberg skal nú royna seg á uppaftur einum marknaði.

Morning Dew hevur lyft Høgna Lisberg frá at vera fyrrverandi Clickhaze trummuleikarin, sum roynir seg sum singer/songwriter, til at vera eitt av best umtóktu føroysku tónleikanøvnunum við væleydnaðum framførslum á Asfalt, G! og Summarfestivalinum og fleiri stórhittum á 15 teimum bestu.

Fløgan varð í fjør givin út í Belgia, Íslandi og Danmark og tá 2007 var 8 dagar gamalt varð fløgan givin út í Sveis.

Fyri nøkrum árum síðan gjørdi Høgni eitt sindur um seg í Sveis, við konsertum og fyrru fløguni Most Beautiful Things. Most Beutiful Things varð ongantíð givin út í Sveis, men var at fáa í onkrum handli umframt, at hon varð seld á konsertunum hjá Høgna. Tað var í sambandi við vitjanina hjá Høgna í Sveis, at hann kom í samband við Marc Allenspach frá Inside Agency, ið er eitt bookingfelag. Hetta samband hava teir hildið øll árini.

Í februar er Høgni boðin at luttaka á einum norðurlendskum festivali í Sveis, Nordklang. Most Beautiful Thinigs var fyrsta norðurlendska fløgan, sum felagsskapurin handan festivalin gav út í Sveis, og síðan hetta er virksemið hjá felagsskapinum vaksið til at fevna um allan norðurlendskan tónleik. Í sambandi við festival luttøkuna, hevur Marc Allensbach avgjørt at geva fløguna út á plátufelag sínum. Útbreiðsluna tekur K-Tel sær av. Hetta er eitt stórt útbreiðslufelag í Sveis og avtalan er sambært Høgna sera góð.

- Tey fáa grafisku fílarnar og ljóðfílarnar og standa so fyri allari framleiðsluni og kostnaðinum av hesum. Hetta minnir um avtaluna, ið eg havi fingið í Danmark. Eg haldi tað er ein fyrimunur, at tey seta peninga í, tí tað forpliktar tey eisini til at royna at selja fløguna, sigur Høgni.

Danski tónleikafelagsskapurin ROSA stuðlar Nordklang í Sveis, og ger hetta m.a. við at senda Høgna Lisberg og bólk til Sveis. Í hesum sambandi hevur bookingfelagið The Inside Agency fingið í lag eina mini útgávukonsertferð, soleiðis at Høgni og bólkurin spæla 6 konsertir í Sveis.

Umframt Høgna og bólkin luttaka m.o. Kristian Blak og Spælimenninir, Valravn, Anfenginn, Hush og Broken Beats.

## Almennur fundur um happing/trivnað

**Hóskvøldið tann 11 . januar kl 19**
verður fundur í fimleikahøllini fyri foreldrum o. ø. áhugaðum.

**Skrá:**
Stig Sørensen, skeiðsleiðari í DK, greiðir frá, hvussu vit kunnu fyribyrgja happing. Høvi verður eisini at seta spurningar!

**Skúlastýrið og Fuglafjarðar skúli**




# Marknaðarrák

**Hendingarík vika**
Hendan fyrsta vikan av 2007 hevur verið hendingarík. Nógv verður aftur handlað á flest øllum marknaðum eftir jólafrítíðina, og prísir hava flutt seg rættiliga nógv. Mest markanta broytingin er hend á orkumarknaðinum, har ráoljuprísurin lækkaði 10% uppá fáar dagar. Hann liggur nú um 55 dollarar fyri tunnuna. So stór lækking var rættiliga óvæntað. Veturin hevur higartil verið heitari enn vanligt í USA, og íleggjarar vænta, at veturin framvegis verður mildur. Hetta minkar um eftirspurningin eftir olju. Lági oljuprísurin stuðlar undir partabrævakursum.

**Lánsbrævarentur støðugar**
Eftir hækkingina á 0,20%-stig í desember hava lánsbrævarenturnar verið støðugar hesa farnu vikuna. 10-ára rentan er nú 3,95%, og hon er sostatt enn lægri enn 1-árs rentan.

**Oljuleitifeløg í undanvindi**
Skipaflutningsfelagið D/S Norden kann fara at hækka. Orsøkin er hækkandi turrlastratur frá einum frammanundan høgum stigi, umframt at skipaprísirnir aftur eru farnir at hækka. Hetta var ein av orsøkunum til at norska reiðaríið Golden Ocean hækkaði 5% mánadagin.
Oljuleitifelagið Mærsk Contractors er í løtuni sera lønandi. Hettar tí endurnýggjanin av eitt til tvey ára sáttmalunum, sum fer fram í ár, verður gjørd til ein væl hægri prís enn fyri tveimum árum síðan, tí oljuprísurin er hægri. Harumframt hevur felagið nýbygningar á veg fyri 17 mia. kr.

**Hesa vikuna**
Hendan vikan verður væntandi merkt av, at farna vika var so hendingarík. Tað koma tó ikki nógv áhugaverd búskapartíðindi. Orkuprísirnir, sum lækkaðu um 10% í farnu viku, og tað at meiri gongd er komin á handilin eftir dvalan í desember, fara væntandi eisini at gera hesa vikuna hendingaríka.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 572,21 | 1,3% | ↑ |
| JPY | 4,82 | 1,5% | ↑ |
| GBP | 1.109,16 | 0,2% | ↑ |
| NOK | 90,17 | -0,4% | ↓ |
| SEK | 81,81 | -0,8% | ↓ |

**Virðisbrøv**

| Norrøn | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 98,42 | 0,2% | ↑ |
| Norrøn Partabrøv | 124,88 | -1,7% | ↓ |
| **VMF** | **Kursur** | **+/- %** | |
| Atlantic Petroleum | 557,00 | 0,9% | ↑ |
| KB Trygg Eurostoxx | 107,69 | 0,0% | → |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*